# BØNARLØTAN

**FEBRUAR** **2026** **41. árg.**



## *1. Sunnudagur* *Matt. 11.1-30*

Hátíðarløta verður við Tinghúsvegin 10 í Havn sunnud. 8. feb. kl. 13:30, tá ið minnisvarði fyri William Gibson Sloan verður avdúkaður, og *Sloans Savn* letur upp. Ebenezerkórið syngur, og hugleitt verður samsvarandi Hebr. 13.7: *Minnist vegleiðarar tykkara...* Aftaná verða øll boðin til drekkamunn í Ebenezer.

### KRINGVARPIÐ

1. feb. útvarpsmøti, Lívdin

### EVANGELISKA RØDDIN á Aldan.fo (meir á www.evr.fo)

Sunnukv. kl. 21 Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskv. kl. 21 Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**



1. feb. verða vit heiðrað fyri trúgva tænastu ígjøgnum 20 ár í Calvary Church í Charlotte, USA. Biðið, at Harrin framhaldandi signar, og at vit eru trúgv í øllum, Hann leggur okkum á hjarta.

## *2. Mánadagur* *5. Mós. 24.1-22*

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 15, Leah 12, Abigail 7**

Fyrst í feb. fer Jóhannis til eitt seminar hjá samkomufelagsskapinum CAEF í Lyon um at stovna samkomur. Vit gleðast um, at vit nú eru fýra familjur, sum eru í toyminum at stovna samkomur. 14. feb. fer Jóhannis til Bristol saman við ungdómspastorinum og trimum tannáringum fyri at fáa eitt samstarv at virka. 10.-24. apr. vitja vit familju og samkomur í Føroyum.

## *3. Týsdagur* *5. Mós. 25.1-19*

**ONGLAND,**
**Personal Support Matters**
**Claire og Craig Niclasen**
**Lydia 15**



Takksom fyri tey, sum taka lut í venjingarskeiðnum, ið endar 11. feb. Tey eru úr átta ymiskum felagsskapum og arbeiða í seks ymiskum londum. Biðið, at tey fáa nógv burturúr, so at tey kunnu hjálpa trúboðarum at útvega sær stuðul. Biðið eisini fyri fundum í Niðurlondum í apríl og teimum uml. 40 luttakarunum.

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna Rodda**

**ZAREPTA**
Vetrarlegur: EYOY 6.-8. feb., bíbliuskúli 9.-13. feb., Mizpa 13.-15. feb., Ebenezer 20.-22. feb. og 27. feb.-1. mars.

## *4. Mikudagur* — *Matt. 12.1-23*



**DANMARK, Hirtshals**
**Ansa og Arnold Mortensen**
**Ewelina 16**

**Anna og Hans Djurhuus**
Leygardagin 7. feb. kl. 19 verður føroyskt møti í Bethaniakirkjuni, Dag Hammaskjøldsgade 2b í Aalborg. Vit verða eisini við á føroyska møtinum í Give Baptistkirke 21. feb. Biðið fyri møtunum og okkum við.



**FØROYAR**
– **Atlantic Mission, Juvel II**
– **Else og Poul Johan Djurhuus**
– **Anna Maria og Rógvi Joensen**
– **Khuldah og Sámal Mikkelsen, Samuel 11**
– **Dora og Niels Pauli Nónstein, Kristina 14**

## *5. Hósdagur* — *Matt. 12.24-50*

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**
Umframt høvið at læra í samkomuni, har vit vanliga ganga á møti, skal eg komandi 3 mán. tala á serligum møtum eina ferð um

mánaðin á eini manstevnu fyri nakrar fáar smáar samkomur. Eg eri ikki í altjóða leiðsluni hjá NTM longur, men regluliga samskiftið við leiðarar í ymiskum londum heldur á.

## *6. Fríggjadagur* — *5. Mós. 26.1-19*



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**
Biðið fyri okkum, sum vit halda fram at gera Skriftina klára at býta út. Tað tykist, sum tey síðstu fetini eru tey drúgvastu. Tilfarið verður býtt út bæði sum bøkur og ljóð.

## *7. Leygardagur* — *5. Mós. 27.1-26*



**OM, SUÐURAFRIKA,**
**OM REACH**
**Tanja og Kurt Abrahams**
**Hanna 2**
Eitt nýtt toymi byrjar á Reach skúlanum 7. feb. Biðið fyri næmingunum, sum koma ymsastaðni frá, at tey falla væl til og uppliva Gud virka og leiða næstu mánaðirnar. Biðið fyri starvsfólkunum, at vit leiða og læra frá okkum við vísdómi og kærleika.

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**
Minnist starvsfólkini á skúlanum, sum gera so ómetaliga týdningarmikið arbeiði, at vit áhaldandi stuðla næmingunum í teirra lestri. Floksundirvísingin endar 17. feb. og byrjar aftur tíðliga í mars. Biðið fyri næmingunum, sum teir ferðast og vitja heima. Vit fyrireika árligu REACH ungdómsstevnuna, biðið fyri teimum, sum skulu taka lut.

## 8. Sunnudagur *Matt. 13.1-30*

### ONGLAND, European Christian Mission
### Dorit og Simon Marshall



Tað var gott at vera heima í tveir mán. eftir longu ferðina í heyst. Vit leggja nú ferðaætlanir fyri árið, har mest umráðandi er at vitja trúboðarar. 10.-12. feb. skal Simon til fundir fyri leiðarar í trúboðarafelagsskapum í Bretlandi. Simon verður í Týsklandi 23. feb.-2.mars, tá ECM-leiðslan hevur fundir.

### FØROYAR
### Shamila og Høgni Johannesen



Biðið fyri møtum, samtalum og okkara tænastu á netinum. Tað tyngir okkum ikki at kunna vera meira í Pakistan, men vit royna at gera arbeiðið har á netinum.

## 9. Mánadagur *Matt. 13.31-58*

### DANMARK, Skovlunde
### Sara og Andrew Berghamar
### Lydia 8

Vit vilja, at bygningurin hjá Skovlunde Frikirke verður fullur av lívi, samfelagi, bøn og tilbiðjan gjøgnum vikuna. Tí hava vit givið einum indiskum felagsskapi høvi til at savnast hvønn fríggjad. til møti. Nú byrjar eisini ein tænasta millum tamilar úr Sri Lanka og India. Tey vilja savnast eina ferð um mánaðin sunnud. s.p. Biðið, at Harrin signar hetta altjóða arbeiði.

## *10. Týsdagur* *5. Mós. 28.1-29*



**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**

Leygardagar koyra vit 2-3 t. vestur til møti og sunnudagar 2 t. norður til annað møti. Biðið fyri kankanaey trúgvandi, sum tysta eftir Orðinum. Heilsan hjá Liz er batnað, og tí ber til at vera við í hesum arbeiði. GT á kankanaey er nú alt í kladduformati á teldu, so nú verður rættlestur og rættingar. Tað krevur nógva tíð, men vit eru spent um at fáa alla Bíbliuna. Um miðjan feb. koma Ryan og fam. úr Kanada at vitja, og vit eru spent at fáa fult hús í 2 vikur. Biðið fyri okkum og verkinum her.



**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Hanna 17**

**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Tabita 12, Debora 10, Natan 7**

## *11. Mikudagur* *5. Mós. 28.30-48*

**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan Zachariassen**

Vit takka Harranum fyri góða heilsu. Bíbliuumsetingararbeiðið í DK heldur fram við Ápostlasøguni, Jónas og Rutt. Møtir eru í Vejle og Rødovre. Jens Pauli í Dali er byrjaður at týða Jónasar bók til føroyskt teknmál, hetta tekur nakrar mðr. Síðani týða vit Rutt. Jan kemur til Føroya í vár at hjálpa við ymiskum. Minnist hetta stóra arbeiðið.

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**
Vit flyta nú úr hølunum, sum føroysku møtini hava húsast í seinastu 10 árini. Adressan er nú Rødegårdsvej 174, 5230 Odense M. Í húsinum eru tvær aðrar samkomur, endurnýtsluhandil og kristin bókahandil.



**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

## *12. Hósdagur* — *5. Mós. 28.49-68*

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 5, Selah Rose 3**
Vit koma til USA 12. feb., til Føroya 29. aug. og verða har allan sept. Vit gleða okkum at síggja nógv tykkara tá. Biðið, at Harrin sendir okkum samstarvsfelagar her í Asmat.

## *13. Fríggjadagur* — *Matt. 14.1-18*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**
Vit fyrireika fýra legur í summar, sum byrja 2. juli og enda 28. Brúk er fyri leiðarum, fólki til køk og matarhøll, reingerð, tónleikarum o.ø. Tilmelding: Marjun Vilhelm, tel. 215181. Arbeiðsfólk/handverkarar at gera kjallara lidnan v.m. í tíðarskeiðnum 2. til 28. juni. Tilmelding: Gordon Martin Midjord, tel. 595900. Møguliga verður ein familjulega í aug.

**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**



Vit takka fyri Harrans signing í 2025. Vit sigla til Grønlands 14. mai. Um hvítusunnuna er ætlanin at vera saman við samkomuni í Nuuk inni í leguhúsinum í Ameralikfjørðinum. Biðið, at Harrin signar ferðina og verkið í Grønlandi, har 55-60 búpláss verða vitjað við gleðiboðskapinum.

## *14. Leygardagur* — *Matt. 14.19-36*

**DANMARK, Kristnastova**
**Ásla og Bárður Norðberg**
**Andrea 5, Boas 3, Jóanes 0**



Sunnudagsskúli er hvønn sunnudag, samstundis sum møti er. Vanliga koma uml. 10-20 børn í aldrinum 0-8 ár. Miriam Jacobsen skipar sunnudagsskúlan saman við øðrum góðum fólki. Biðið fyri børnunum og teimum, ið standa fyri sunnudagsskúlanum.

**Susan og Øssur Berghamar**

Tænastan millum sjúklingar og avvarðandi er týðandi, og vit seta stóran prís upp á kunning og forbønir tykkara. Vit taka enn ímóti brúktum frímerkjum, hóast brøvini eru fækkað munandi.
berghamar@kristnastova.dk

**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**

Vit fyrireika summarlegurnar í samráð við fólk í Føroyum. Kunning: +299 263509 el. filipsivertsen@gmail.com.

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

*Í dag fyllir Aron Joensen 14 ár

## *15. Sunnudagur* *5. Mós. 29.1-15*



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**
Eg havi gjøgnumgingið kladduna av Ezra og Nehemias við unga umsetaranum. Vit eru nú í holt við 5. Mós. Áðrenn NT verður prentað, skal tað lesast fyri einum bólki. Hetta virkar sum bíbliutímar. Vit møtast fimm kvøld um vikuna. Nógv er at gera. Biðið, at tað gongur væl, og at vit fáa hvíldina, ið okkum tørvar. Óvist er, nær 1. Kong. verður kannað av umsetingarráðgevanum. Vit mugu laga okkum eftir, at føstumánaðurin hjá størsta trúarbólkinum byrjar 17. feb., og tá er ikki lætt at fáa fólk at hjálpa okkum. Biðið, at vit finna ein góðan málhjálpara til kanningina.



**TURKALAND, Istanbul (fj.arb.)**
**Annika og Stephen Everett**
Biðið fyri smáum bólkum og samkomum, ið møtast, serliga í Eysturturkalandi, at tey halda á, hóast tey ofta hava langan veg til onnur trúgvandi. Biðið, at fleiri fáa opinberingar og dreymar um Jesus, nú føstumánaðin byrjar 17. febr. Minnist starvsfólk og sjálvboðin, ið arbeiða við bíbliubrævskeiðnum.

**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**



## *16. Mánadagur* — *5. Mós. 29.16-29*

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 12, Micah 12**
Fleiri av hjálparfólkunum, serliga í sunnudagsskúlanum, flyta burtur í ár. Biðið, at Harrin reisir upp trúgv tænastufólk í teirra stað.

**FØROYAR**
**Birgit og Svenning av Lofti**
**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Vanja og Svein í Prestgarði, Terji 13, Petra 11**
**– Birita og Petur á Roykheyggi**

## *17. Týsdagur* — *Matt. 15.1-20*

**Mission Aviation Fellowship, MAF Føroyar**
**Martha og Andrias Hansen**
Vit eru í samráðingum við MAF International um, hvar vit fara, og hvørjar venjingar mangla. Sum støðan er nú, er stórur tørvur á flogskiparum í Suðursudan og í Papua Ný Guinea. Biðið, at Gud leiðir avgerðini, og at vit kunnu fara væl avstað.

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

## *18. Mikudagur* *Matt. 15.21-39*



**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 13, Emma 9**
Biðið fyri øllum bólkunum í samkomuni: smábørn, børn, ung 11-15 ár, ung 16+ ár, hjún, familjur, kvinnur, menn. Biðið, at allir bólkarnir trívast og vaksa.

## *19. Hósdagur* *5. Mós. 30.1-20*



**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**
Vit verða heima í Nebraska allan feb. Daniel og familjan, sum virka í Indonesia, vitja okkum um miðjan feb. Vit skulu leggja til rættis ein umsorganarbólk, ið skal hjálpa trúboðarum. Biðið um vísdóm til hetta. Hans og familjan fara aftur til Miðasia 25. feb. eftir at hava verið í farloyvi.

## *20. Fríggjadagur* *5. Mós. 31.1-15*

**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 8, Timon 6, Manuel 2, Salome 2**
Hetta árið verður spennandi. Samstarvsfelagar okkara, Stanleys, koma aftur til Kovol í feb. Vit ætla at fáa kovol lesi- og skriviútbúgvingina lidna saman, og so fara vit at byrja okkara fyrsta

undirvísingarflokk við at læra tey at lesa og skriva á teirra egna máli. Biðið, at arbeiðið at leggja seinastu hond á útbúgvingina skal ganga skjótt, og at frálæran byrjar skjótt.

## *21. Leygardagur* — *5. Mós. 31.16-30*



**MEKSIKO, Maravito**
**Isabel og Edy Mora**
**Marianna 0**

Fleiri grannar komu, tá vit bjóðaðu til tamales og atole í des. Edy greiddi frá, hví vit halda jól. Biðið, at vit røkka út og eru ljós her í grannalagnum. Vit halda fram við bíbliutímum í heimunum.

## *22. Sunnudagur* — *Matt. 16.1-28*

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 14**

Biðið fyri Noah, ið skal taka fýra vísdómsjakslar fyrst í mánaðinum, av tí at hann skal hava boyla.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**



**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

Vit fyrireika summarlegurnar. Biðið, at Harrin signar og gevur okkum vísdóm og alt, sum okkum tørvar. Biðið, at myndugleikarnir vísa okkum vælvild.

## 23. Mánadagur 5. Mós. 32.1-25

**DANMARK, Frikirken Bindslev**

Í sept. 2025 byrjaði nýggj samkoma í Bindslev. Vit savnast hvønn sunnud. kl. 11 til breyðbróting. Sunnudagsskúli er kl. 12, og kl. 13 er bíbliutími ella evangeliskt møti. Undan jólum gingu vit hurð til hurð í grannalagnum, og vit fingu høvi at práta við øll húskini við sangi og eini jólakurv. Hetta var ein signingarríkur dagur. Kæru náðisystkin, biðið fyri verkinum í nýggju samkomuni.



**FILIPSOYGGJAR,**
**Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

## 24. Týsdagur 5. Mós. 32.26-52

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Jónatan 16, Markus 13, Evita 10, Joy 9**

Biðið, at vit sum samkoma og trúgvandi ikki missa mótið, men óttast Harran meir enn menniskju. At Harrin gevur okkum náði til at tæna Honum væl her.



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 17, Noah 16, Karis 12,**
**Judah 10, Ethan 8**

**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 9, Jude 7, Evelyn 5, Olivia 2**

## 25. Mikudagur Matt. 17.1-27

**OM, LOGOS HOPE, TeenStreet**

Herfyri var kunningarkvøld fyri ung. Vit vístu á, hvussu ungdómurin kann førleikamenna seg og tæna Gudi í styttri tíð. Vit vístu á REACH-bíbliuskúlarnar og møguleikan hjá ungum í summar. Jóhanna H. Olsen úr Lamba er á STEP I við Logos Hope fram til apr. Biðið fyri okkara ungdómi, at Harrin leggur teimum á hjarta at brúka sínar gávur og sína tíð at tæna Gudi millum tey minst náddu í øllum tjóðum. Biðið eisini fyri Jóhannu, Súsannu og Guttormi á Logos Hope. Biðið um vernd, gleði í tænastuni, og at tey eru til signing. Minnist eisini Margareth, OM-landsleiðaran, og tey, sum tæna við OM í Føroyum.

## 26. Hósdagur 5. Mós. 33.1-17

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 16**

Elektrikarar komu at dagføra elektrisku skipanina á gistingarhúsinum hjá okkum í Dakar. Hetta er bønarsvar, og nú er næstan alt gjørt. Tað var gott, at Marion kundi fara til USA at hjálpa foreldrunum í 3 vikur. Biðið fyri nýggju samverkafólkunum, ið júst eru byrjað at læra franskt, at tey trívast og falla væl til í nýggja umhvørvinum.

*Í dag fyllir Selah Rose Hansen 3 ár

## 27. Fríggjadagur 5. Mós. 33.18-29

**TAILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 14, Noah Kristian 11**

Komandi mán. fara fleiri starvsfólk aftur til heimlond síni í longri

tíðarskeið. Tí mugu starvsfólkini, ið eftir eru, átaka sær teirra uppgávur. Biðið um vísdóm og orku, so vit øll megna øktu arbeiðsbyrðuna, og um einleika í starvsfólkatoyminum, nú vit hava serliga nógv um at vera.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

*Í dag fyllir Rebekah Niclasen 18 ár

## *28. Leygardagur* — *5. Mós. 34.1-12*



**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 16, Nana 14, Louie 12, Rio 6**
Biðið fyri okkara enskt-kafé. Seinastu mán. hava vit miðvíst tosað meira um Gud, Jesus og Bíbliuna. Tað eru fleiri, sum eru givin at koma, tó eru vit glað og eggjað, at nøkur koma enn og eru opin fyri tí, vit hava at siga. Biðið fyri hesum arbeiði, og at nýggj koma við.


| | |
|---|---|
| Útgevari | KBS (Kristniboðssambandið) |
| Blaðnevnd | Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest og Sigurð Ó. Vang. |
| Avgreiðsla | Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057 |
| Uppseting | Grafikmaster, tel. 502022 |
| Myndasavn | info@grafikmaster.fo |
| Prent | Føroyaprent, tel. 314555 |
| Teldupostur | prayerservicefo@gmail.com |
| Heimasíða | www.kbs.fo |

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705


©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.




Bob Hartman er kendur frásøgumaður og hevur skrivað yvir 100 barnabøkur. Leygard. 7. mars í Ebenezer fer hann at undirvísa um, hvussu bíbliusøgur kunnu sigast á ein livandi og skiljandi hátt, serliga fyri børnum. Skeiðið er fyri øll: sunnudagsskúlalærarar, lærarar, foreldur, ommur, abbar – eisini tey, sum undirvísa vaksnum. Á skránni eru undirvísing, praktisk venjing, sangur og samvera.

Skeiðið (við mati) er ókeypis, men tilmelding er neyðug. Skanna QR-kotuna í erva ella ring til Ruth Gaardlykke, Atlantic Mission, 519090. Øll eru hjartaliga vælkomin!

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!

FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo